Fróðskaparsetur Føroya
University of the Faroe Islands

*Søgu- og samfelagsdeildin*
Faculty of History and Social Sciences

## Skeiðslýsing

| | |
|---|---|
| **Skeiðsnummar / Course number** | 2068.17 |
| **Heiti / Title** | Føroysk fiskivinnusøga<br><br>Faroese History of Fishing |
| **ECTS námsstig / ECTS** | 10 |
| **Fortreytir / Prerequisites** | Tey lesandi skulu hava miðnámsútbúgving ella samsvarandi førleika.<br><br>Evnisøki á fimta semestri. Skeið í hjánám í søgu. Valskeið í Politikk og umsiting & Sosialvísindi og samfelagsplanlegging. Stakskeið (gjald). |
| **Stig / Level** | Bachelor |
| **Endamál / Purpose** | At veita teimum lesandi grundleggjandi kunnleika til fiskivinnusøgu Føroya, og geva teimum lesandi eina breiða fatan av, hvussu fiskivinna gjørdist høvuðsvinna í Føroyum, og hvussu tað hevur ávirkað samfelagið tvær tær síðstu øldirnar. |
| **Innihald / Content** | Tey lesandi fáa gjøgnum skeiðið breiðan kunnleika um føroyska fiskivinnusøgu, umframt hvussu henda vinna ávirkaði búskap og samfelag. Føroyska søgan verður eisini samanborin við fiskivinnusøguna í grannalondunum. Leitað verður aftur til elstu keldur um útróður í bóndasamfelagnum, nógv verður gjørt burtur úr royndunum at menna havfiskiskap í 19. øld, og fylgt verður við menningini av fiskivinnuni í 20. øld.  Dentur verður lagdur á at |

| | |
|---|---|
| | geva teimum lesandi kunnleika til dygdargóðar fakligar bókmentir um evnið, umframt førleikar til at miðla hesa vitan til onnur. |
| **Læru- og undirvísingarhættir / Learning and teaching approaches** | Skeiðið er 30 tímar. Undirvísingin verður skipað sum fyrilestrar, framløgur og kjak. Skeiðið verður skipað í tveir høvuðspartar. Studentarnir skulu hvør sær ella í bólkum velja sær eitt evni og orða ein spurdóm at skriva uppgávu um. Í tí sambandi skulu studentarnir eisini leggja spurdómarnar fram til kjaks við hinar studentarnar. |
| **Læruúrtøka / Learning outcomes** | Tá skeiðið er liðugt, skulu tey lesandi kunna:<br>• greiða frá grundleggjandi søgugongdini í føroysku fiskivinnusøguni.<br>• duga at síggja samanhangir millum føroysku fiskivinnusøguna og líknandi søgu í grannalondunum.<br>• greiða frá grundleggjandi hugtøkum, sum verða brúkt í fiskivinnusøguligari gransking.<br>• meta um, hvørja ávirkan fiskivinnan hevur havt á samfelagið í ymiskum tíðarskeiðum<br>• sjálvstøðugt megna at leggja fram og viðgera eitt ávíst evni við tí fyri eyga at fáa nýggja vitan fram. |
| **Próvtøkuháttur / Assessment methods** | Próvtøkan er ein individuel ritgerð á í mesta lagi 6000-7000 orð um eitt evni ella sjónarmið, sum undirvísarin góðkennir umframt munnlig próvtøka við støði í bæði ritgerð og lestrarlista. Í ritgerðini skulu tey lesandi prógva, at tey megna at gera eina greining við støði í teimum málum, ið eru nevnd undir læruúrtøka/Learning outcomes. Fyri at standa próvtøkuna skal tann lesandi frammanundan hava hildið eina munnliga framløgu. |
| **Próvdøming / Examination** | Uttanseturs próvdøming. |
| **Próvtalsstigi / Marking scale** | Galdandi próvtalsstigi. |
| **Lestrarlisti / Bibliography** | Umleið 1.000-1500 síður. |
| **Ábyrgd / Contact** | Erling Isholm |